## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo



*Bergtóra Høgnesen*

**MYND:** VILMUND JACOBSEN

# Kjøtið vann **á dessertini**

**HON** HEVUR LÆRT TIL **KONDITTARA**, MEN **ARBEIÐIR** NÚ Á FIMMTA ÁRI VIÐ KJØTI Í **KJØTBÚÐINI** Í AKRANESGØTU Í HAVN, SUM ER Í TRIÐJA **ÆTTARLIÐI**. TAÐ VAR JENS REINERT, SUM **STOVNAÐI** FYRITØKUNA Í **1938** – OG Í DAG ER TAÐ **ABBASONUR** HANSARA, ODDUR REINERT, SUM STENDUR FYRI **LEIÐSLUNI**

Bergtóra Høgnesen er ættað úr Klaksvík. Foreldrini eru Regin og Kristina Høgnesen. Pápin er ættaður av Norðoyri og mamman er úr Mikladali. Tey búgva í Klaksvík, og tað var her, at Bergtóra sleit sínar barnaskógvar. Tá omman og abbin búðu í Mikladali, var hon eisini nógv har og vitjaði.

Tá Bergtóra var vorðin hálvvaksin og gekk í framhaldsskúla í Klaksvík, plagdi hon eftir skúlatíð at arbeiða á Roykivirkinum hjá Juliusi Johannesen. Hon arbeiddi eisini á Roykivirkinum, áðrenn hon sum 17 ára gomul í 1991 fór til Havnar í læru sum kondittari hjá Frants Restorff.

### Hugurin birtist

– Eg veit ikki ordiliga, hví eg valdi at fara í læru sum kondittari, men eg helt, at hetta ljóðaði áhugavert og spennandi. Lærumeistari hjá mær hjá Frants Restorff gjørdist pápabeiggi mín, Rólant Høgnesen, sáli. Haraftrat høvdu ommusystir mín og maður hennara bakarí í Klaksvík. Tí visti eg eitt sindur um hetta, og kanska var tað hetta tilknýti sum gjørdi, at hugurin birtist til at læra til kondittara, sigur Bergtóra.

At læra til kondittara tók fýra ár. Í summarfrítíðini uppundir endan av lærutíðini slapp hon eisini at royna seg á bakarínum umborð á Norrønu. Henni dámdi væl at sigla og arbeiða umborð, og tey næstu árini eftir, at hon hevði fingið læruna í hús, sigldi hon sum kondittari við Norrønu um sumrarnar.

– Hetta var vanliga frá umleið hálvum mai og eina ella tvær vikur út í september. Minnist eg rætt, sigldu vit ein vetur eisini. Mær dámdi væl umborð á Norrønu, og eg fekst mest við dessertir umborð, og eg bakaði eisini eitt sindur. Annars hjálptust við at við øllum tí vanliga, sigur hon.

Í vetrarhálvuni, meðan Bergtóra sigldi við Norrønu og enn búði í Klaksvík, arbeiddi hon eitt nú í fiski á Kósini, bæði í saltfiskinum og inni á flakavirkinum.

Hon gavst at sigla í 2001.

Tey næstu árini arbeiddi Bergtóra Høgnesen í køkinum á Sjómansheiminum í Havn, men meðan hon var í farloyvi, tá hon og Sámal fingu dóttrina, læt Sjómansheimið aftur.

– Tey fyrstu árini, meðan eg arbeiddi á Sjómansheiminum, var Kjøtbúðin í kjallaranum har. Tey komu upp við pylsum, farsi og ymiskum, sum vit keyptu og seldu okkara viðskiftafólkum, sum komu á gátt. Soleiðis kom eg at kenna tey, sum varaðu av framleiðsluvirkseminum í kjallaranum.

### 5 ár í kjøti

Nú vit skriva 2011, hevur Bergtóra Høgnesen arbeitt í Kjøtbúðini í næstan fimm ár.

– Meðan eg var í farloyvi, fór eg heim at tosa við Odd, sum er triðja ættarlið og stjóri í Kjøtbúðini í dag. Tað var leyst og liðugt beinanvegin, og eg fekk starv hjá teimum.

Hon sigur, at tá hon byrjaði at arbeiða hjá Kjøtbúðini, var virksemið flutt út í góðar umstøður í Akranesgøtu í Havn.

– Tí upplivdi eg ikki at arbeiða í kjallaranum á Sjómansheiminum, har Kjøtbúðin helt til í mong, mong ár, sigur hon.

Bergtóra, sum í dag er 37 ára gomul, stórtrívist í sínum starvi hjá Kjøtbúðini.

– Høvuðsframleiðslan hjá okkum er hakkikjøt, fiskafars og ikki at gloyma sera væl umtóktu rullupylsuna, sum Kjøtbúðin er so kend fyri.

Hon sigur, at tey, sum starvast í framleiðsluni, skiftast um at gera ymisku arbeiðini, ið skulu gerast gjøgnum ein dag.

– Arbeiðsdagurin byrjar klokkan 7.30 ella klokkan 8, og vit arbeiða vanliga til klokkan 16. Eg havi nú verið her í sløk fimm ár, og mær dámar arbeiði sera væl, sigur Bergtóra Høgnesen, sum livir saman við Sámali Hansen.

Bergtóra og Sámal búgva á Norðasta Horni í Havn og eiga saman eina dóttir, sum er seks ára gomul, og Sámal eigur eina dóttir sum er 16.

### Triðja ættarlið

Kjøtbúðin er gomul fyritøku, sum nú er í triðja ættarliði.

Tað var Jens Reinert, sum stovnaði fyritøkuna í 1938, og heilt fram til ár 2005 helt Kjøtbúðin til í kjallaranum á Sjómansheiminum í Havn.

Stjóri í dag er Oddur Reinert, sum er abbasonur Jens Reinert og sonur Otto Reinert, sum nú er 83 ára gamalur.

Í Kjøtbúðini í Akranesgøtu 7 í Havn starvast 8 fólk.

## FAKTA

**Navn:** Bergtóra Høgnesen
**Starv:** Matvøruframleiðari
**Besta við starvinum:**
At framleiða dygdargóðar vørur
**Ringasta við starvinum:**
Tá alt ikki gongur eftir vild
**Starvstíð:** Fimm ár
**Starvsfólk:** 8
**Staður:** Akranesgøta 5, Tórshavn
**Stjóri:** Oddur Reinert